# NSÍ vann sannførandi

**VODAFONEDEILDIN** Dysturin millum B68 og NSÍ gjørdist als ikki ein spennandi og tøtt grannauppgerð. NSÍ var klárt betra liðið, og vann ein sannførandi 0-3, í einum dysti har Christian Høgni Jacobsen enn einaferð vísti hvør dugur er í honum

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| B68 | 0 |
| NSÍ | 3 |

Runavíkingar hava hánirættin á eystara armi á Skálafjørðinum. Hetta varð staðfest við einum greiðum 0-3 sigri í grannauppgerðini móti B68 á Svangaskarði mikukvøldið. Sigurin hjá NSÍ sum er tann triði á rað, hevur samstundis við sær at runavíkingar fara fram um B68 á stigatalvuni.

Meðan runavíkingar frøast um greiða sigurin í grannauppgerðini, so kunnu toftamenn bert hyggja at egnum avrikum mikukvøldið, sum als ikki vóru nøkandi. Har var ov lítil stríðsvilji og hugflog í spælinum hjá B68. Somuleiðis gjørdu toftamenn alt ov nógv mistøk, sum kostaðu teimum dýrt.

### Mistak gav NSÍ leiðsluna

Fyrri hálvleikur var javnur. Hvørki av liðunum megnaði at fáa yvirtakið á miðvøllinum, og nógvi vindurin gjørdi tað ikki lættari hjá leikarunum. Av tí sama varð talan ofta um rótut spæl hjá báðum pørtum, og av tí sama komu kjansirnir ofta av tilvild. Tíðliga í dystinum hevði Pól Jóhannus Justinussen ein góðan kjans, sum Gango í NSÍ málinum tók sær av. Seinri hevði Klæmint Olsen ein stútara, men bólturin brast í stongina.

Runavíkingar høvdu vindin í ryggin í fyrra hálvleiki, og hevði tað við sær at deyðbóltar blivu sera vandamiklir. Og var tað eftir júst eitt hornaspark stutt undan hálvleiksteðginum, at NSÍ legði seg á odda, tá B68 málverjin ikki fekk bóltin burtur av vandaleið, og so var lagamanni hjá Christian Høgna, sum hevði føðingardag mikudagin, at takka fyri (føðingardags)gávuna, og skumpa bóltin síðsta strekkið inn um strikuna.

### NSÍ væl betri eftir steðgin

Eftir steðgin skuldu runavíkingar spæla móti vindinum, og tað kláraðu teir til fulnar. NSÍ var spælstýrandi í stórum parti at seinra hálvleiki, meðan toftamenn høvdu trupult við at fáa fatur á bóltinum. Leikliga yvirtakið hjá runavíkingum gav úrslit 10 minuttir eftir hálvleiksteðgin. Eftir skjótt og gott samanspæl, fekk Klæmint Olsen bóltin, og royndi seg við skoti, har bólturin umvegis ein toftamann fann leiðina í málið. Stutt eftir at NSÍ hevði lagt seg á odda 0-2, køvdi Christian Høgni alla vón hjá toftamonnum, tá hann skoraði til 0-3.

Eftir at vera komnir á odda 0-3, settu runavíkingar á »cruise control«, og høvdu fult tamarhald á toftamonnunum. Tað gjørdi ikki støðuna hjá B68 betri, at Óli Olsen var vístur av vøllinum tá tað restaðu 20 minuttir. Tað komu ikki fleiri mál í dystinum, sum NSÍ sostatt vann 0-3.

Úrslitið gevur ábendingar um ein greiðan sigur til runavíkingar, og tað var tað eisini. Toftamenn høvdu lítið og einki at bjóða á Svangaskarði mikukvøldið. Tí var tað fult uppiborið at NSÍ vann grannauppgerðina. Við sigrinum á B68 fóru runavíkingar fram um toftamenn á stigatalvuni.

*post@sosialurin.fo*



*NSÍ liðskiparin, Chritsian Høgni Jacobsen, er ikki til at steðga í løtuni*

*Mynd: Hilmar Jan Hansen*

### Christian Høgni Jacobsen:

## *Ein góð føðingardagsgáva*

Christian Høgni Jacobsen hevði føðingardag mikudagin, og tað var ein fegin tvífaldur málskjúttu, sum sosialurin fekk orðið á eftir dystin.

– At vinna á grannunum úr B68, var ein sera góð føðingardagsgáva, sigur Christian Høgni.

– Tað var sera trupult at spæla fótbólt í dag, tí tað var so nógvur vindur. Hóat truplu umstøðurnar, so vóru vit klárt betra liðið, og komu fram til fleiri góðar kjansir. Tískil er tað fult uppiborið at vit vunnu dystin, sigur Christian Høgni Jacobsen.

Sigurin á B68 var triði sigurin á rað hjá NSÍ, og sæst tað aftur á stigatalvuni, har runavíkingar eru farnir frá aftasta plássi, og liggja nú á fimta plássi, við 10 stigum.

# EB/Streymur vann botndytin

**VODAFONEDEILDIN** Týdningurin á dystunum var alstórur fyri bæði liðini

Ólavur Øre Hansen

| | |
|---|---|
| EB/Streymur | 2 |
| AB | 1 |

Av tí sama gjørdist talan um ein dyst, sum var merktur av nervum og ósamanhangandi spæli, men líka leggja sundalagsmenn í. Teir vunnu 2-1, og tað er tað sum telur

Tað er eingin ivi um at sundalagsmenn eru fegnir um sigurin á AB, sum hevur við sær at EB/Streymur vann sín fyrsta dyst síðani teir bastu FC Suðuroy í triðja umfari.

Hjá argjamonnum er støðan alt annað enn góð. Eitt er at AB liggur á aftasta plássi, men tað sum verri er, er hvussu teir skulu koma burtur úr ringu støðuni. Ikki tí, teir royndu og stríddust fyri hvørjum bólti, men tað var bara ikki nokk.

### Rótut spæl

Tað var týðiligt at síggja, hvussu stóran týdning dysturin hevði fyri bæði liðini. Líti samanhangandið spæl, nógvar feilsendingar, og nógvir steðgir í spælinum, gjørdu sítt til at hvørki av liðunum orduliga fekk gongd á egið spæl.

Eftir eina slaka byrjan, fingu gestirnir brotspark burtur, tá ein EB/Streyma leikari tók bóltin við hondini. Edvard Ble var tryggur frá ellivu metrum og legði AB á odda.

Sum fyrri hávleikur leið tóku vertirnir meira og meira yvir, og vóru sera nær við at javna, men argjamenn bjargaðu á strikuni tvær ferðir í sama álopi.

Men tá fyrri hálvleikur var gott og væl hálvliðin bragdaði hjá EB/Streymi. Santos, sum var eygsýndur í fyrra hálvleiki, spældi banda við Sorin, og fekk prika bóltin fram við Tórur í AB málinum. Eitt væl gjøgnumført álop. Fleiri mál komu ikki í fyrra hálvleiki, sjálvt um EB/Streymur hevði onkran kjans.

### Gert Hansen avgjørdi

Dystargongdin var tann sama í seinra hálvleiki. Millum lítið og onki samanhangandi spæl, tó at vertirnir høvdu takið á dystinum. AB royndi at verja, og spældi nógv við longum sendingum upp móti Stig-Roar Søbstad, men har kom ov lítið burtur úr.

Sundalagsmenn royndu at leggja eitt ávíst trýst á, og komu fram til nakrar kjansir, men sum so ofta fyrr í hesum kappingarárinum, so var ov lítið bit í EB/Streyma álopinum.

Tá 70 minuttir vóru leiktir, fekk EB/Streymur forloysandi málið. Vertirnir senda bóltin inn í AB brotsteigin, har Aristide stútar bóltin burtur, men beint til Gert Hansen, sum takkaði fyri tilboðið við at smekka bóltin í kassan til 2-1.

Eftir at vera komnir á odda strýrdu sundalagsmenn spælinum, og tað gjørdi ikki støðuna betur hjá AB at Tórur Thomsen varð rikin av vøllinum fyri at hava brúkt seg móti dómaranum. Hóast teir vóru 10 móti 11, so var sera nær við at AB fekk javnað í síðstu løtu, tá Stig-Roar fekk ein góðan kjans, men sundalagsmenn fingu vart fyri, og sluppu við skrekkinum.

Samanumtikið so høvdu sundalagsmenn munin, og var tað tí uppiborið at teir vunnu dystin, meðan AB enn einaferð fór av vøllinum við ongum, og tað er ikki ein gongd leið, um teir ætla at vera verandi í Vodafonedeildini.

*post@sosialurin.fo*

### Egil á Bø:

## *Ótrúliga umráðandi sigur*

– Vit skuldu vinna hendan dystin, segði ein fegin, men avgjørdur Egil á Bø eftir dystin, tá Sosialurin fekk orðið á hann. Spælið var ikki tað besta, og Egil á Bø metir at sundalagsmenn spældu sín vánaligasta dyst higartil, men menn vóru fokuseraðir uppá at fáa sigurin í hús, og tað eydnaðist. Spurdur um hvat sigurin á AB hevur at týða fyri sundalagsmenn, sigur Egil, at tað alt at siga, tað gevur sjálvsálit, og trúnnu uppá at vit nokk skulu koma sterkt aftur, eftir eina vánaliga byrjan uppá kappingarárið.